## → RAKSTRARLEIÐARI TIL PF. ATLANTIC BIOTECHNOLOGY



Vilt tú vera við til at stjórna einum slóðbrótara innan føroyska fiskivinnu? So er starvið sum rakstraleiðari á Pf. Atlantic Biotechnology leyst at søkja.

### UM TEG

Tú vísir fyrst og fremst engagement og dugir at leiða og taka avgerðir. Tú hevur eisini viðkomandi royndir innan matvøru-framleiðslu, og fyrimunur er at hava útbúgving og innlit í framleiðslustýring og innaneftirlit á matvøruvirkjum.

Sum rakstrarleiðari fært tú ábyrgd av dagligu framleiðsluni, har tínar uppgávur verða at skipa arbeiðið og at tryggja, at framleiðslan lýkur ásett krøv.

Talan er í fyrsta lagi um royndartíð á 3-6 mánaðir við góðum møguleika fyri føst-um starvi. Løn sambært avtalu.

### UM OKKUM

Atlantic Biotechnology arbeiðir við framkomnari virðisøking av fiskatilfeingi, eitt nú við at virka proteinkonsentrat og olju á ymsum góðskingarstigum.

Fyritøkan, sum heldur til á Oyri, varð stovnað í 2006 og hevur síðan miðvíst fyrireikað grundarlagið undir framleiðsl-uni.

Talan er um nýbrot í føroyskari tilfeingis-vinnu, og klárt er nú at fara til verka.

UMSÓKNIR
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til Atlantic Biotechnology, Postboks 70, FO 450 Oyri. **Umsóknarfreistin er 15. november 2010.**

Vilt tú hava meira at vita um starvið, set teg í samband við Gest Hovgaard, stjóra, á telefon 564101 ella á abt@abt.fo.

SENDISTOVAN




WWW.GREENGATE.FO

# vit leita eftir júst tær!



## Skrivstovulærlingur søkist til ferðavinnu-fyritøkuna P/F Green Gate Incoming

**Vit sóknast eftir** skrivstovulærlingi at byrja 1. januar 2011.

**Vit bjóða** eitt spennandi starv, har tú m.a. ert við til at selja og menna Føroyar sum ferðamannaland.

**Umsøkjarin skal:**

- hava lokið FHS ella HH prógv
- vera væl fyri í skandinaviskum og enskum
- vera vanur at arbeiða við teldu
- hava góð samstarvsevnir
- kunna arbeiða sjálvstøðugt

**Lærutíðin** er 2-3 ár, og starvið verður lønt sambært S&K sáttmála.

**Umsókn** við prógvum skulu sendast til:

Green Gate Incoming
J. Broncks gøta 35
FO-100 Tórshavn

Ella sendast við telduposti til info@greengate.fo

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi 1. desember.**

Green Gate Incoming

J. BRONCKS GØTA 35 | TEL 350 520 | FO-100 TÓRSHAVN | INFO@GREENGATE.FO




Mánadagin 15. november klokkan 15:00 skipar Virðisbrævamarknaður Føroya fyri almennum íleggjarafundi í Kaffihúsinum í Vágsbotni.

Í sambandi við at listaðu feløgini í hesum tíðum kunngera sín roknskap fyri 3. ársfjórðing, fær almenningurin lýst, hvussu tað gongur hjá feløgunum og fær høvi til at seta spurningar.

Øll eru hjartaliga vælkomin á fundin.

Skráin:

| | |
|---|---|
| 15:00 | VMF bjóðar vælkomin |
| 15:05 | Magni Arge, stjóri í **Atlantic Airways,** leggur fram |
| 15:35 | Súni S. Jacobsen, stjóri í **BankNordik,** leggur fram |
| 16:05 | Kaffisteðgur |
| 16:20 | Ben Arabo, stjóri í **Atlantic Petroleum,** leggur fram |
| 16:50 | Regin Jacobsen, stjóri í **Bakkafrost,** leggur fram |
| 17:20 | Endi |

ATLANTIC PETROLEUM · ATLANTIC AIRWAYS · BANKNORDIK · BAKKAFROST

VMF Virðisbrævamarknaður Føroya
The Faroese Securities Market